# Stoffskiftisfelagið

# Tórshavn

# Ársfrásøgn

# 2018

Ársfrásøgnin 2018 framløgd og góðkend á aðalfundi felagsins tann 29/6 2019.

Fundarstjóri

# INNIHALDSYVIRLIT

Síða

Upplýsingar um felagið ........ 2

Leiðsluátekning ........ 3

Átekning frá óheftum grannskoðara ........ 4

Nýttur roknskaparháttur ........ 5

Rakstrarroknskapur ........ 6

Fíggjarstøða ........ 7

## UPPLÝSINGAR UM FELAGIÐ

| | |
|---|---|
| **Felagið** | Stoffskiftisfelagið<br>Landavegur 65<br>FO-100 Tórshavn |
| | Roknskaparár: 1. januar til 31. desember |
| **Nevnd** | Anna Dahl-Olsen, Landavegur 65 - Tórshavn<br>Beinta Dahl-Olsen, Reynsgøta 69 - Argir<br>Armgarð Arge, Hanusargøta 5 - Tórshavn<br>Sigrid Højsted, Millum Gilja 48 - Hoyvík<br>Annika Højsted – Oman Hoydalar 25 – Hoyvík |
| **Grannskoðari** | **MENTA**<br>skrásettir grannskoðarar Sp/f<br>J. Broncksgøta 16<br>Postboks 16, FO-110 Tórshavn<br>Telefon 310 901, Telefax 319 640<br>t-postur: menta@menta.fo<br>www.menta.fo |

## LEIÐSLUÁTEKNING

Nevndin, ið hevur ábyrgdina av ársfrásøgnini, hevur í dag viðgjørt og samtykt ársfrásøgnina fyri 2018 hjá Stoffskiftisfelagnum.

Ársfrásøgnin er tillagað ásetingunum í galdandi føroysku ársroknskaparlóg.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi soleiðis, at ársfrásøgnin gevur eina rætta mynd av ognum og skyldum, fíggjarligu støðuni, úrsliti av virksemi felagsins í roknskaparárinum og at felagið hevur nóg gott gjaldføri til framhaldandi rakstur.

Ársfrásøgnin fyri 2018 verður hervið løgd fyri ársaðalfundin til góðkenningar.

Tórshavn, tann 24. juni 2019

Nevnd:

Anna Dahl-Olsen
forkvinna

Beinta Dahl-Olsen

Armgarð Arge

Sigrid Højsted

Annika Højsted

## ÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA

**Til limirnar í Stoffskiftisfelagnum**

**Átekning á ársroknskapin**
Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Stoffskiftisfelagnum fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2018 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi og fíggjarstøðu. Ársroknskapurin er tillagaður ársroknskaparlógini.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**
Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Henda ábyrgd ber í sær, at felagið støðugt hevur tað innanhýsis eftirlit, ið skal til fyri at ársroknskapurin kann gerast, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, at nýttur verður hóskandi roknskaparháttur og at roknskaparligu metingarnar, sum gjørdar eru, eftir umstøðunum mugu ætlast at vera rímiligar.

**Grannskoðanin og ábyrgd grannskoðarans**
Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi galdandi føroyskum grannskoðanarreglum, ið krevja, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørt verður tað arbeiði, sum skal til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Grannskoðarin metir eisini um innanhýsis eftirlitið, ið skal til fyri at felagið kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at støða verður tikin til, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.
Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**
Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31. desember 2018 og av úrslitinum av virksemi felagsins í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2018 samsvarandi ársroknskaparlógini fyri smá feløg.

Tórshavn, tann 24. juni 2019

**MENTA**
skrásettir grannskoðarar Sp/f

Hermund Jacobsen
skrásettur grannskoðari

## NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

**Alment**
Ársfrásøgnin er gjørd eftir niðanfyri standandi roknskaparreglum.

**Alment um innrokning og virðisáseting**
Inntøkur verða rakstrarførdar, so hvørt sum tær verða vunnar. Sama er við virðisbroytingum á fíggjarligum ognum og skyldum. Kostnaður, ið hoyrir árinum til við tíðaravmarkingum verður rakstrarførdur við møguligum av- og niðurskrivingum, svarandi til roknskaparárið.

Ognir og skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at framtíðar fíggjarligir fyrimunir fara at koma felagnum tilgóðar og virðið á ognunum og skyldunum kann metast álítandi. Ogn og skyldur verða fyrstu ferð tiknar við til útveganarvirði og eftir tað verður hvør roknskaparpostur viðgjørdur, sum gjøllari lýst niðanfyri.

Tá ið ogn og skyldur verða innroknaðar og virðisásettar, verður lagt upp fyri væntaðum tapi og váða, ið vísir seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum avsanna ella sanna viðurskifti, ið komu til greinar við ársfrásagnarframløgu.

### Rakstrarroknskapurin

**Inntøkur**
Inntøkur verða inntøkuførdar, so hvørt sum hesar verða goldar felagnum.

**Rakstrarkostnaður**
Allur rakstrarkostnaður felagsins, ið hoyrir árinum til við tíðaravmarkingum, verður rakstrarførdur svarandi til rakstrarárið.

**Fíggjarpostar**
Fíggjarligar inntøkur og kostnaður, ið hoyrir árinum til við tíðaravmarkingum, verða rakstrarførd svarandi til rakstrarárið. Fíggjarpostar eru rentuinntøkur og -kostnaður.

### Fíggjarstøða

**Áogn**
Áogn verður tikin við til amortiserað útveganarvirði, ið vanliga svarar til áljóðandi virði, við frádrátti og niðurskriving ímóti tapi.

**Fremmand skuld**
Øll stuttfreistað skuld verður tikin við til niðurgoldið (amortiserað) útveganarvirði, ið vanliga er áljóðandi virði roknskapardagin.

**Veð- og eventualskyldur**
Veð- og eventualskyldur verða upplýstar og avsettar eftir neyðugum tørvi aftast í ársfrásøgnini.

## RAKSTRARROKNSKAPUR

| | 2018 | 2017 |
|---|---|---|
| | kr. | kr. |
| **Inntøkur** | | |
| Limagjald | 30.000 | 28.350 |
| Stuðul frá MEGD | 29.344 | 15.604 |
| Gávur | 450 | 5.314 |
| | 59.794 | 49.269 |
| **Kostnaðir** | | |
| Limagjald til Thyroidea Landsforeningen | 13.800 | 14.500 |
| Tiltøk, fundir | 36.233 | 5.819 |
| Heimasíða | 0 | 27.085 |
| Porto | 4.443 | 3.978 |
| **Kostnaðir samantalt** | 54.476 | 51.382 |
| **Úrslit** | **5.318** | **-2.114** |

## PENINGUR

| Peningarensl | 2018 | 2017 |
|---|---|---|
| Betri Banki pf. 147 460 1 1/1-2018 | 123.937 | 126.051 |
| - úrslit frá rakstri | 5.318 | -2.114 |
| **Tøkur peningur 31/12-2018** | **129.255** | **123.937** |

**Nota 1 - inntøka av limagjøldum**
Felagið hevur 150 limir sum gjalda kr. 200,00 í part árliga.